

*– »Achtung Baby«, tann útgávan hev›i størri t‡dning fyri 90'ini, enn Sgt. Pepper nakrantí› hev›i fyri 60'ini*

# »The heart is a bloom, it shoots up through the stony ground«

**(«Beautiful Day — U2)**

*Birgir Kruse*

***Beautiful Day****; ney›ugi hit-sangurin vi› pounce í og mín sann kennast teir longu religiøsir her í fyrstu skering?* Ja, fløgan byrjar vi› hesum upp-peppa›a sangi, i› minnir meg aftur á allarfyrstu fløgurnar, og løg sum »I Will Follow«, sum tú spældi í Útvarpinum í 1980. Hesin n‡ggi sangur hevur longu ligi› nummar 1 á popptindunum, og ta› er eisini skilligt. Lagi› er gott, og teksturin er meiri jar›bundin og einfaldur enn tekstirnar annars hava veri› leingi. **»Stuck In A Moment You Can't Get Out Of«** *ein deiligur sangur; um trupul vi›urskifti millum tvey, ella er ta› um okkara vi›urskifti vi› bólkin, altso lurtarin og U2?* Ja, hetta er kanska eitt ta› vakrasta lagi› eg havi hoyrt ófatiliga leingi. Ein intens ballada um at missa, men samstundis at vita, at hetta er ein løta, sum fer at fara. Og ikki minst eitt ni›urlag, sum bønar um at ver›a tralla› afturvi›. **»Elevation«** *teir moderna›u techno-U2 frá »Discotheque« og »Lemon« - og kanska ein feril av Primal Scream og Nirvana eisini?* Ja, ta› er sum heiti› sigur ta›, ein upplyftur sangur. Kanska ta› nærmasta vit koma tí intensa og hálv-larmandi rokksangunum, sum annars hava veri› nokkso frammaliga á fløgunum hjá U2. **»Walk On«** *er ein klárt religiøsur sangur! Slagarin av n‡ggju fløguni?* Helst ta›, hetta er eitt av løgunum, sum eg veit, fara at gerast millum heimsins bestu í míni ver› um ein mána›a ella tveir. Ein sangur vi› grei›um religiøsum undirtónum, og jaliga ni›urlagnum **»walk on«** ella halt á. **»Kite«**- *eru hetta fjar minni frá ein endurspegling av Sgt. Pepper, sum kom, sá og sigra›i? Hin vakrasti sangurin á hesari fløgu haldi eg; í sterkari kapping vi› Stuck in a moment...í løtuni í hvussu er. Hvat heldur tú Petur?* Hetta er eitt lag, sum Bono skriva›i aftaná at hava roynt at pápast vi› dóttrunum. Men drekin helt sær bert nøkur fá sekund. Men burtur úr hesum kom avgjørt vakrasta lagi› á fløguni. Samdur. **»In A Little While«** *- jamen er hetta ikki »Under the Bridge« vi› Red Hot Chili Pepper? Men tó - ein klárur soulsangur á la Wilson Pickett og Committments.* Ja, hetta er ein sera einfaldur og strippa›ur sangur, sum kanska fær meg at hugsa um sein 90ara tónleikin, har bólkar sum Red Hot Chili Peppers og Pearl Jam ímynda tann nakna on intensa sangin, sum er beint har. »Wild Honey« hetta er elegant og akustiskt; feitur elbassur og ein klárur farri av Rolling Stones uppá ta› besta...og prógvar fyri ta› fyrsta, at U2 duga at rokka vi› kassaguitarum, og at teir eisini hava lurta› dúgliga til Van Morrison, Bob Dylan og ikki minst Rolling Stones, sum tú sigur, seint í 70unum. **»Peace On Earth«** *er ein jólaslagari, avgjørt. Eingin ivi. Nummar eitt á jólum. Allar handilshur›ar eru opnar fyri hesum, fri›ur á jør› - ta› eru jól. At brúka banalitetir og sentimentalitet krevur dirvi og dugnaskap, skal ta› hepnast. Akkurát sum hjá Lars von Trier í Dancer in the Dark. Eg haldi bá›ir partar - Trier og U2 - hepnast heilt væl vi› hesum sentimentala leiki, hvør í sínum lagi...*Ja, hetta er kanska sterkasti teksturin, Bono hevur skriva › sí›ani **»One«**. Sum ein nevi í gronina sigur hann, hvussu troyttur hann er av at hoyra, at ta› er fri›ur á jør›, samstundis sum alsamt fleiri ver›a dripin og jar›a› afturvi› útvatna›um religiøsum klisje'um. Avgjørt ein stakfløga, sum fer at fylla MTV um jóltí›. **»When I Look At The World«** *— er hetta ein stórb‡ar-sálmur? eru vit í London? ella?* Hetta er kanska eitt bræv til ein prædikumann, sum allarhelst b‡r í einum stórb‡i. Ta› er so syrgiliga lætt at stilla seg upp á eitt podium og prædika um, hvussu ver›in sær út, um bert eitt sett av eygum sær hana, og brillurnar kanska ikki eru so væl pussa›ar. **»New York«**, *ja her er so eingin ivi. Í heimsins stórsta súrepli mitt ímillum kjarnur,*




*ormar, Lou Reed og Sinatra. Praktfullur biti.* Hesin sangur sta›festir hvussu spjaddar røturnar hjá einum fólki kunnu vera. Samstundis ber New York eisini bo› um, at ma›urin, sum hevur sæ› rastloysi, stórb‡ir og alt møguligt ørkymlandi eisini fær sett seg ni›ur og strekt beinini. At enda er lagi› **»Grace«** sum er eitt vakurt lag, vi› einum einfaldum teksti, sum spælir sær vi› tvít‡dningin í or›inum »grace«, sum merkir ná›i, men eisini er eitt nógv brúkt gentunavn. »Grace finds beauty in ugly things«, og hetta stendur kanska eftir, aftaná at hava hoyrt fløguna nakrar fer›ir. At hóast ver›in er stór og ørkymlandi, fylt vi› so nógvum lorti, so ber til at finna ná›i í smálutum, so sum at vera pápi, ma›ur og sangari í heimsins besta bólki. *Jú tú, alt av ná›i. Ta› havi eg altí› sagt. Men tó* **»The ground beneath her feet«** *hesin sangur manglar á mínari fløgu. Bara teksturin er prenta›ur á húsanum. Og eingin minni enn Salman Rushdie eigur hann. Tekstin altso. Men sangin havi eg ikki funni›. Veitst tú naka›?* Ja fyrst skuldi hann ikki vera vi› og so aftur og fram. Men endin var› at hann bert finst á ljó›sporinum til Wim Wenders-filmin »Million Dollar Hotel« og kom slettis ikki vi› á hesa n‡ggju U2-fløguna, hóast hann stendur í tekstheftinum.

(Birgir og Petur um U2 »All that you can't leave behind« Island 2000)

## KRISTNIR SANGIR

Í sambandi vi› túsundárahaldi› helt Petur Jensen fyrilestur fyri 10. floks næmingum í Eysturskúlanum um tónleikin hjá U2. Høvu›sdenturin var› lagdur á kristiligar og bíbilskar endurspeglingar í tekstum teirra. Umframt at siga, at allir sangir hjá U2 hava ein íbornan kristnan bo›skap, vór›u hesir sangir lisnir saman vi› næmingunum, vi› høvu›sdenti á ta› kristiliga og bíbilska:

1. Gloria

2. I still haven't found what I'm looking for

3. Until the End of the World

4. The First Time

5. Wake up Dead Man

6.Peace on Earth

*(Petur Jensen í Eysturskúlanum 31.10.00)*

## DAGBÓKIN

MÁNADAGUR 30.10.
Eg havi sjáldan veri› so spentur, sum eg havi veri› allan dag. Eg havi glett meg sum eg veit ikki hvat til at n‡ggja U2 fløgan, »All That You Can't Leave Behind« skuldi koma í handlarnar. Eg eri ikki 11 ár longur. Nú eri eg 27, so eg havi kanska eitt sindur búnari forhold til U2, men tá eg gekk oman í handilin, kendi eg meg ikki nógv eldri enn 11. Henda n‡ggja fløgan er ógvuliga nakin og jalig, positiv. Hetta kann vísa seg at vera ein stórur biti at gloypa, men ta› man kanska fara at ganga. Og nú havi eg so siti› og hoyrt fløguna einar 3 — 4 fer›ir. Og lat ta› bara ver›a sagt; eg elski hana longu. Og ta› visti eg væl, at eg fór. Hesafer› er ma›urin, sum tær seinastu tríggjar fløgurnar hevur reika› rastleysur um í heiminum og myrkrinum á veg heim aftur. Bono er fyltur 40, hevur vitja› pávan, Kofi Annan, Nelson Mandela og er komin væl á lei› at frelsa heiminum, men er eisini komin til sættis vi› at vera pápi (enn eitt, sum eg eigi eftir á), nærkast mi›aldarkreppu og hvat veit eg_.men hann torir at siga, at hann ikki er uttan vón.

(Petur Jensen)





## Ney›ugt vi› pengum…

*Hvussu skilja tit millum mentan í tykkara st‡ri? Hava tit nakran frymil, ella líknandi; eg hugsi um b‡ti sum skapandi list, i› er tengd beinlei›is at arbei›andi listafólki; var›veitandi list, sum meira er tengd at søvnunum og so t.d. ítróttina, skótarnar o.s.fr., sum vit kanska kunnu koyra í ein annan bólk, ella? Eg meini so vi›, koyra tit alt hetta í ein pott og skriva mentan uttaná?*

Hugsi at ta› í mongum førum er tilvildin sum hevur rátt. Ta › hevur ongantí› veri› nakar yvirskipa›ur politikkur. Kanska hava teir, i› hava rópt har›ast veri› mest leska›ir. Og sjálvandi skal alt ikki vera so fastlæst, at ein n‡ggjur landsst‡risma›ur ikki fær vent sær, ikki fær dugna á økjum sum liggja hansara hugsjónum næst. Men naka› væl av kontinuiteti skal til, og tí er ta› at vit í løtuni sita og leggja sí›stu hond á eina mentunarvirkisætlan, i› ver›ur løgd fram til a›alor›askiftis á Føroya Løgtingi her í vetur.

Ta› skal ver›a mín vón, at tjaki› kemur út um politisku eingjargar›arnar. Eitt frálíkt forum, sum hetta hjá tykkum á Sosialinum ver›ur væntandi eitt tjaktorg eftir at áliti› er lagt fram. So syndarligt hevur ta› veri› frammanundan, at skuldi tú vera á lei› ajour á mentanarøkinum, so mátti tú í minsta lagi ver›a haldari av Weekend-avísini ella Information, bara fyri at nevna tvey donsk blø›, sum nógvir føroyingar lesa, i› eru áhuga›ir í mentanarspurningum. Vónandi ver›ur politikkurin meiri mi›vísur eftir hetta tjaki› ella rættari or›askifti›.

*Eg skilji, at ta› ber til at søkja Mentamálast‡ri› um løn, um ein arbei›ir vi› einhvørjari verkætlan á mentunarliga økinum. Altso uttanum Mentunargrunnin og tær starvslønir, sum har eru. Hvussu eru treytirnar - í stuttum - fyri hesum; hvørjir møguleikar eru, og ber til at fáa at vit hvørjar verkætlanir av hesum slagi eru í gongd?*

Ja, ta› hevur veri› naka› av or›askifti um hesa konto. Hon kallast: Stu›ul til onnur endamál — strategisk tiltøk. Onkur hevur nevnt hesa kontoina fyri eina svansikonto hjá landsst‡rismanninum. Ta› harma›i meg serliga nógv, at ta› júst var ein javna›arma›ur, i› málbar seg solei›is. Vit hava sett 2 milliónir á hana. Kann nevna, at øll nor›urlond hava eina slíka. Elsebeth Gerner Nielsen hevur sett 580 milliónir á hana, og hetta skuldi svara› til slakar 6 milliónir i føroyskum mátistokki. Kravi› er at tú kemur vi› eini verkætlan, sum ver›ur professionelt vurdera› her í st‡rinum. Eg fari ikki at nevna nøkur nøvn her, men á listanum sum eg havi liggjandi framan fyri mær, sæst, at ta› er ein brei›ur skari, úr øllum landinum, sum er stu›la›ur. Kann nevna m. a. konsertfer›ir hjá kórum, dansifer›ir uttanlands, 1000 ára haldi› o.s.fr.

Og eitt skal tú vera vísur í, at hesin landsst‡risma›urin hevur somiki› stóra vir›ing fyri føroyska skattgjaldaranum, sum slítur reyvina út ígjøgnum buksurnar hvønn dag, at hann fer ikki at svansa vi› hansara peningi. Og skuldi hann ivast í onkrari avger› hjá embætisfólkinum, so er hann eisini førur fyri at ste›ga henni promte.

*Høvu›ssta›arkommunan hevur hepnast at or›a ein mentunarpolitikk og nú er so bara at vóna, at hann sæst aftur í verki hjá politiska mundugleikanum. Nú liggur hann so á røttum bor›i. Men hvussu gongst vi› at or›a ein landsfevnaandi mentunarpolitikk, solei›is sum samgonguskjali› leggur upp til?*

Ja, nú veit eg at tú sjálvur var vi› í hasum arbei›num, og ta› fari eg at takka tær fyri. Tú hevur skil fyri slíkum, ta› hevur tú prógva› m. a. í Útvarpinum. Eg eri sera takksamur fyri, at Tórshavnar b‡rá› hevur sló›a› fyri á hesum øki. Her hevur Leivur víst seg sum ein visioneran mann og politikkara. Vónandi spyrst naka› burturúr. Solei›is at eisini a›rar kommunur kundu tiki› eftir. Harinni hjá okkum hevur ta› veri› ógvuliga smáb‡tt, tá i› ta› galt mentanini. Asfalt & betong-virusi› hertekur allar kommunalpolitikkarar, líkamiki› hvussu djúpar og gó›ar hugsaninnar annars kundu ver›a frammanundan vali, tá i› tosi› var meiri óforpliktandi. Ta› b‡r ein lítil stalinistur í nógvum av teimum. Ta› ræ›ur um at seta var›ar eftir sær. Fysiskar altso. Onkursvegna mega vit koma á tal vi› kommunurnar so hesi vi›urskiftini kunna broytast í framtí›ini. Spurningurin um hin landsfevnandi mentanarpolitikkin haldi eg er svar›a›ur omanfyri, - í svari› no. 4.

*Summi eru fegin, bara okkurt kemur út, og ta› er føroyskt. Antin ta› er bók, fløga ella anna›. Onnur vilja seta krøv til dygd. Tey siga at hatta nationalromantiska vi› at alt er gott bara ta› er føroyskt hoyrir til eina farna tí›. Nú mugu vit seta krøv, skal naka› henda. Hvat heldur tú um hetta sjónarmi›? Hvør skal set møgulig krøv um dygd tá um mentunararbei›i og -avrik ræ›ur í Føroyum í dag?*

Tja, Birgir, nú gongur tú nær. Torført at svara. Í vanligum handli og vandli er ta› jú markna›urin sum ræ›ur fyri hvati› ver›ur útgivi›. So í prinsippinum er ta› væl høvu›sreglan. Men sum tú veitst, so hava vit ein rættiliga avmarka›an markna á hesum øki, málbólkurin er so evarska lítil. Eg haldi, at ta› var Bettina Heltberg sum skriva›i um hesar politikkarnar, i› ikki vóru anna› enn eggvætir, eitt afturljó› av stø›ustemninginum til eina og hvørja tí›. Teir i› liggja eina tonn frammanfyri ver›a ikki valdir. Ta› sama ger seg møguliga galdandi á hesum økinum. Jú, eg haldi at ta› skula setast krøv, og ta› skula í hvussu er ikki vera politikararnir i› gera ta›, tá enda vit aftur í Sovjetstatinum. Hetta má mentanarelitan sjálv finna útav. Og eg haldi at hatta ráki›, vi› at taka føroysku produktini framum bara tí at tey eru føroysk, er ein farin tí›. Og altjó›ager›in kemur um stutta tí› at forkoma hesum heimfø›ispolitikkinum heilt.

*Forma›ur Rithøvundafelagsins Gunnar Hoydal gró›ursetti í fjør tann áhugaverda tanka, at í komandi tí›um - og um so er, at vit raka vi› olju - so eigur oljuvinnan av hvørjari tunnu at lata ein pott til mentanina. Minst. Hvat heldur mentamálará›harrin um hesa visión?*

Eg havi skift or› vi› Gunnar um hetta. Eitt fínt hugskot. Men kanska hevur Ey›un Eltør eina a›ra hugsan um hendan spurningin. Fyrst og fremst skula oljupengarnir brúkast til eina æviga konsuli-dering av føroysku republikkini. Ikki ein króna út til rakstur av samfelagnum. Men íløgur í mentan og infrastruktur ska›ar ikki. Ger bara samfelagi› hugaligari at liva og virka í.

*Mong streingja á og vilja út í stóra heim vi› føroysku mentanini. Í øllum teim frábrigdum, hon kann bjó›a. Mentanin. Hvat er at gera, til tess at røkka hesum endamáli? Altso at gera avmarka›a markna›in størri? Ella skal ta› vera ein einstaklingauppgáva?*

Fyrsta treytin er sjálvandi at produkti› er í lagi. At kvaliteturin er bor›barur í stóra heiminum. Men eg veit at ta› er tungt. Tí mega vit fáa meiri skipa›i vi›urskifti á hesum mótinum. At m. a. okkara ungu yrkjarar í dag eru kendir í nor›anlondum er einamest einum idealisti sum Ebbu Hentze fyri at takka.

Hev›i hon ikki av áhuga og vi› offurvilja t‡tt teir úr føroyskum, var ta› ikki ein sál sum visti um teir. Las eina yrking hjá Jóanesi Nielsen upp fyri álendska mentamálará›harranum eitt kvøldi, vit ótu døgver›a á einum sjósavni í Mariehamn. Total kvirra. Tá i› ein fiskima›ur kemur lei›andi vi› bá›um døtrunum omaneftir Niels Finsensgøtu, vi› gó›ari føring, á Ólavsvøku. Hon kendi stemningin aftur úr sjómannalívinum har yviri í Eystrasalti. Og var ikki so líti› hugtikin av, at vit áttu so gó›ar yrkjarar í hesum lítla landinum.

*Um vit at enda venda aftur til or›ini hjá Carl Johan Jensen í Sosialinum herfyri, so ver›ur sagt, at "tann føroyski teksturin allatí›ina er í einari ólagaligari kapping vi› danskan tekst í Føroyum". Hvat heldur mentamálará›harrin um hesa útsøgn og hvørji stig ætlar mentamálará›harrin at taka til tessa at styrkja føroysku stø›una, eitt nú í máttmiklasta mi›ili okkara?*

Ja, nú var eg eitt sindur argur inn á Carl Jóhan í á›ni, men mær dámar hann bara væl allíkavæl. Hann er ein fínur yrkjari og greinahøvundur. Og hann hevur rætt. Vit mega styrkja stø›una hjá føroyska málinum áhaldandi. Nú er ta› málár í evropu næsta ár. Tá fara vit at sláa eitt slag fyri mó›urmálinum.

Og sjónvarpi›.

Ja, nú hevur ta› ligi› í andaleypi, sum eitt b‡tisbarn, í alt ov langa tí›. Men her skal naka› gerast. Og ta› skal gerast skjótt. Vit eru í fer vi› at leggja sí›stu hond á broytingarnar í kringvarpslógini.

Vónandi fáa vit tá eina mediapolitiska diskussión um sjónvarpi›, og vónandi fáa vit tá loyst upp fyri spurninginum um, hvussu fram skal farast. M.a havi eg altí› hildi ta› veri› ó›amannaverk, at ikki allar sendingar eru føroyskt teksta›ar. Spurningurin er um vit skula hava eitt føroyskt sjónvarp ella ikki. Og ta› kostar. Alternativi› er at keypa 12.000 stk. stálkampar og lata hvørjum húsarhaldi eina í var›veistlu. Og sí›ani at sløkkja sjónvarpi›. Har stendur vali›.

*Hvussu bær ta› til, at mentamálará›harrin las úr Victor'sa bíblíut‡›ing, tá Gospelstevnan var› sett í Nor›urlandahúsinum herfyri? Ikki tí eg havi naka› í móti tí, tvørturímóti. Ta› er ta› bera forvitni!*

Tá i› eg fylti átjan ár, tá ringdi omma mín í Gøtu su›ur til skyldmannin Annfinn Zachariassen, i› tá hev›i bókhandil á Káta Horninum, og ba› hann um 1 stk. Bíbil. Ein ommusonur hennara skuldi hava hana í fø›ingardagsgávu.

Og ta› var eg.

Hon var í t‡›ingini hjá Viderø & Dahl. Havi brúkt hana sí›ani. Og nú tá i› vit forlistu uppi í nor›ur-Noregi, ja, tá lá hon undir koddanum, og eg fekk hana ikki vi› mær, tíansheldur naka› anna›. Og ta› harmiliga var so, at hon samstundis var útseld. Kona mín átti hana í t‡›ingini hjá Victor, so eg lánti hana frá henni. Ta› kann sum so ver›a líka miki›, hvøri› t‡›ingin er, ta› er substansurin, i› er avgerandi.

Og mær dámar væl personagur av hesum slagnum sum Victor, samdur ella ósamdur, teir ganga beint ímóti málinum, strugglarar sum ongan ótta eiga. Seinri havi eg so fingi› fatur á hinari bíbliuni aftur. Eri sum landsst‡risma›ur føddur limur í Føroya Stiftsstjórn. Greiddi Hans Jákupi, bispi, frá orsøkini til ta› sum tú nú spyrst um. Og tá gav hann mær ta› sí›stu bíbliuna av hesum slagnum, i› til var. Og ta› var eg sjálvandi sera takksamur fyri. Ein kirkjuministari skal helst eiga eina Bíbil, annars heldur jú alt uppat.

*Næsta ár ver›ur Listafólkahálti› hildin í august mána›i. Hvat kundi mentamálará›harrin fremst av øllum hugsa› sær at uppliva› á eini tílíkari stevnu?*

Bob Dylan & Bubbi Morthens & Silvio Rodriguez.

Tøkk fyri meylpráti› og gó›a eydnu framyvir!